Sosialurin

...títt vinnublað





VINNAN

VINNU- OG HANDILSTÍÐINDI Í SOSIALINUM

# Elektron trýr uppá IP-telefoni

**Mobilitetur og høg góðska hava alt at siga, um vinnukundar av álvara skulu taka IP-telefoni til sín, ljóðar tað frá Elektron, sum í næstum setur ferð á marknaðarføringina av teirra framkomnu IP-loysn til føroyska vinnulívið**

SAMSKIFTI
*Edmund Jacobsen*
*edmund@pressecentrum.dk*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Síðani í summar hevur fyritøkan Elektron bjóða fram eina loysn, har ið ber til hjá vinnukundum at nýta fartelefonina sum IP-telefon. Ein loysn, ið er tann fyrsta av sínum slag í landinum, og sum er eitt týðiligt tekin um, at IP-telefoni er í størri menning í Føroyum.

– Vit hava gjørt sera lítið við at marknaðarføra loysnina higartil. Men royndirnar hava víst, at loysnin riggar sera væl. Afturmeldingarnar frá kundunum eru stak góðar, og tí fara vit í holt við at marknaðarføra loysnina í næstum, sigur Sóleyð Hofgaard frá Elektron.

Tann loysnin, ið Elektron bjóðar fram ger, at haldarar ikki nýtast aðra telefon enn eina sonevnda ”smartphone” – til dømis eina Nokia E71, sum Sóleyð Hofgaard sjálv nýtir.

– Um ein er staddur innanhýsis á virkinum, so virkar telefonin sum ein tráðleys IP-telefon. Fer ein til dømis út á kundavitjan, so fer samskiftið fram umvegis vanligt GSM. Líkamikið um tað er GSM ella IP, so hevur telefonin fast lokalnummar, so stillast kann um á sama hátt sum til eina vanliga fastnet-telefon, sigur Sóleyð Hofgaard.



*Ein Nokia E71 ella onnur Nokia E telefon, er alt ið krevst fyri at fáa atgongd til nýmótans IP og GSM tænasturnar frá Elektron, ljóðar tað frá Sóleyð Hofgaard*





## Mobilitetur í hásæti

Men loysnin frá Elektron fer enn víðari. Tað ber til at heinta teldupost og hava atgongd til felags kalendara umvegis Exchange ella Notes postskipan við telefonini – líkamikið um ein hevur samband umvegis IP ella GSM.

- Tað, sum okkara kundar serstakliga hava fegnast um, er, at við hesari loysn og einari framkomnari fartelefon, ber til at hava atgongd til eitt nú skjøl, teldupost og kalendara, líkamikið um ein er staddur á skrivstovuni, í einum fundarhøli í býunum ella uttanlanda, sigur Sóleyð Hofgaard.

– Tær nýggju og framkomnu fartelefonirnar hava við sær, at tað ikki er neyðugt at hava farteldu við sær fyri at avgreiða tær týdningarmestu uppgávurnar. Tað ber væl til umvegis telefonina, samstundis sum tað er trygt. Missur ein telefonina burtur, bert til hjá Elektron at læsa atgongdina til telefonina, soleiðis at ongin atgongd fæst til teldupost ella kalendara. Tryggur mobilitetur fær alt størri týdning innan vinnulívið, og hesum tørvi ganga vit nú á møti, leggur hon afturat.

## Góð móttøka

Sambært Sóleyð Hofgaard hava kundar hjá Elektron tikið væl ímóti loysnini, ið fær støðugt fleiri haldarar. Millum annað av tí orsøk, at tað ber til at velja ymiskar eykatænastur, so sum videofundir, hagtøl, Call Center - alt eftir tørvinum hjá fyritøkuni.

Føroysku peningastovnarnir teljast ímillum fyrstu kundarnar, men alsamt fleiri fyritøkur fáa eyguni upp fyri loysnini. Sóleyð Hofgaard greiður frá, at av tí at talan er um eina loysn, har ið Elektron hevur tamarhald á sambandinum, ber til at veita eitt sera støðugt samband – munandi betri enn umvegis vanligt internetsamband. Hetta verður gjørt við at seta bandbreiddina hjá kundanum eftir hvussu nógvar samrøður eftir ætlan skulu fara fram samtstundis.

– Vit eru stak nøgd við úrslitini higartil – serstakliga tá ið havt verður í huga, at loysnin nærum ikki er marknaðarførd. Vit vænta, at tá ið vit um stutta tíð seta ferð á marknaðarføringinia, fer eftirspurningurin at økjast enn meira. Vinnulívið krevur mobilitet, og tí meta vit, at útlitini fyri einari slíkari loysn eru góð, sigur Sóleyð Hofgaard.

## Stutt um IP-telefoni

**Voice over Internet Protocol (oftani stytt VoIP ella IP-telefoni) er ein háttur at senda samrøður millum tveir ella fleiri persónar umvegis alnótina ella onnur IP-netverk. Best kenda VoIP-tænastan er Skype (www.skype.com), ið virkar sum eitt sonevnt peer-to-peer (vin-til vin) samband umvegis alnótina. Skype kann tó ikki tryggja støðuga góðsku, og tí eftirspyr vinnulívið í størri mun loysnir, har ið góðskan – ella Quality of Service sum tað eitur í fakmáli – er á sama støðið sum við vanligum telefonum. Umframt kostnaðin eru fyrimunirnir við VoIP millum annað, at til ber at knýta ymiskar eyka talgildar tænastur til telefonskipanina.**

**Demich P/F Tórshavn**
Postboks 378 - Stiðjagøta 2
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 309 310
demich@demich.fo

**Demich P/F Vágur**
Á Marknoyri
FO-900 Vágur
Telefon +298 37 35 35
demich@demich.fo

**Demich P/F Runavík**
Heiðavegur 80
FO-610 Saltangará
Telefon +298 445500
demich@demich.fo

VØLUND VARMETEKNIK



HITI • VENTILATIÓN • SANITET

Vit hava røttu loysnina til júst tín tørv.

Umhvørvisvinarlig orka við hitapumpu frá Demich

demich